## Rinda løgregluni fyri upplýsingar

Síðani morðið á svenska uttanríkisráðharran, Onnu Lindh, hava summi svensk bløð borið tíðindi, sum sambært bløðunum eru komin frá keldum í løgregluni.

Nú sigur ein fyrrverandi blaðstjóri á Expressen, at hetta er einki nýtt, og at bløð sum Expressen og Aftonbladet rinda løgreglumonnum pengar aftur fyri tíðindi. Olle Westberg sigur, at Expressen hevur eina serliga konto, sum millum annað verður nýtt til at samsýna løgreglumonnum, sum lata blaðnum tíðindi. Talan kann vera um 500 krónur ella 1.000 krónur, men tað hendir eisini, at løgreglumenn fáa upp í 5.000 krónur fyri onkur spennandi tíðindi, sigur Olle Westberg.

Fyrrverandi blaðstjórin á Expressen sigur, at leiðslan á gamla blaði hansara veit um mannagongdina, men tað vil núverandi blaðstjórin ikki gera viðmerkingar til. Sambært Olle Westberg stendur tað heldur ikki á at fáa løgreglumenn at bera tíðindi, sum annars ikki eru almenn.

## Statoil til Brasil

Norska oljufelagið Statoil hevur sett sær fyri at leita eftir olju á einari leið á brasilska landgrunninum.

Brasilsku myndugleikarnir fara at hava eitt nýtt útbjóðingarumfar um stutta tíð, og tá ætlar Statoil at liggja framvið. Felagið hevur longu fingið sær skrivstovu í Rio de Janeiro. Stjórin á deildini, Jacob Sannes, sigur við Aftenposten, at felagið hevur góðar vónir um at fáa minst eitt leitingarloyvi, og at felagið er til reiðar at fara undir at royndarbora einarferð í 2005. Statoil arbeiðir saman við almenna brasilska oljufelagnum, Petrobras, sum situr á 90 prosentum av brasilska landgrunninum.

Jacob Sannes ivast ikki í, at fleiri aðrar norskar fyritøkur kunnu fáa gagn av tí, fær Statoil leitingarloyvi í Brasil. Norsku kongshjúnini eru í hesum døgum á almennari vitjan í Brasil, og saman við teimum er eitt stórt tal av vinnulívsfólkum, sum fegin vilja hava fótafesti í landinum.

## Svii í al-Qaeda

Svenska blaðið Aftonbladet vil vera við, at ein 50 ára gamal svii stendur á odda fyri teirri deildini av yvirgangsfelagsskapinum al-Qaeda, sum heldur til í Svøríki. Maðurin skal eisini hava tætt samband við einum av teimum, sum eru skuldsettir fyri at hava lagt atsóknirnar at USA tann 11. september í 2002 til rættis.

Sambært Aftonbladet er tað spanska løgreglan, sum hevur avdúkað leiklutin hjá tí 50 ára gamla svianum. Undir avhoyringum skal spanski læknin Baktazar Garzons hava greitt sponsku løgregluni frá, at ein maður í Svøríki, sum gongur undir navninum Abu Amin, er leiðari í teirri svensku deildini hjá al-Qaeda. Baltazar Garzons skal eisini havt sagt, at Abu Amin hevur fleiri ferðir verið í Spania og tosað við deildina hjá al-Qaeda har.

Aftonbladet skrivar, at svenska trygdarløgreglan hevur avlurtað trettan telefonsamrøður, sum Abu Amin hevði við sínar felagar í Spania. Men hann er ikki tann einasti svenski ríkisborgarin, sum verður settur í samband við al-Qaeda. Sambært Aftonbladet verður minst ein annar svii settur í samband við felagsskapin hjá bin Laden.

## Børn arbeiða við tubbakki

Eitt blað í Bangladesh avdúkaði um vikuskiftið, at meiri enn 25.000 børn í landinum arbeiða innan landsins tubbaksídnað.

Ittefaq skrivar, at børnini arbeiða á umleið hálvthundrað smáum verksmiðjum, sum gera sigarettir. Men lønin er syndarlig. Børnini fáa sambært blaðnum minni enn tvær krónur fyri hvørjar túsund sigarettir, sum tey gera. Arbeiðsviðurskiftini eru eisini syndarlig. Verksmiðjurnar eru vanliga smáir jarnskúrar, og nógv av børnunum líða av astmu og tuberklum, skrivar Ittefaq.

Blaðið vil eisini vera við, at seinastu fimm árini eru minst 30 børn deyð av sjúkum, sum tey hava fingið av tubbaksarbeiðinum, men blaðið ivast ikki í, at tað veruliga talið er væl størri, tí nógv børn koma ongantíð undir læknahond og verða tí heldur ikki skrásett. Barnaarbeiði er bannað við lóg í Bangladesh, men kortini arbeiða børn í nógvum vinnugreinum har.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Blair visti betur

**Fyrrverandi bretski uttanríkisráðharrin, Robin Cook, vil vera við, at Tony Blair, forsætisráðharri, longu undan krígnum í Irak visti, at irakar høvdu eingi hópoyðingarvápn.**

IRAK-KRÍGGIÐ

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Robin Cook skrivar hetta í nýggju bók síni, "Point of Departure".

Hann skrivar, at hann tvær vikur undan álopinum á Irak hevði eitt prát við Blair, og tá skal forsætisráðharrin hava sagt seg vita, at stýrið hjá Saddam Hussein hevði eingi hópoyðingarvápn.

Robin Cook var uttanríkisráðharri í stjórnini hjá Blair, men fór frá fyri at mótmæla avgerðini hjá forsætisráðharranum at leypa á Irak.

Í bókini skrivar Cook, at hóast Tony Blair alment segði seg bíða eftir úrslitinum hjá ST-vápnaeftirlitsmonnunum í Irak, so var hetta ikki veruleikin. Tvørturímóti skal Blair hava sagt, at úrslitið hjá Hans Blix og hansara monnum fór ikki at fáa nakra ávirkan á fyrireikingarnar til kríggið.

- Og Tony gjørdi ikki tað minsta fyri at fjala, at hetta var hansara støða, skrivar Robin Cook.

Robin Cook skrivar eisini, at ráðgevararnir hjá Balir og serliga Alastair Campbell lupu vóru sinnaðir at gera alt fyri at tekkjast teimum politisku leiðarunum í Washington.

# Arnold best fyri



*Eru veljarakanningarnar eftirfarandi, fer filmsleikarin Arnold Schwarzenegger at vinna guvernørvalið í amerikanska statinum Kalofornia í dag. Men undirtøkan hansara er minkað nakað, síðani tað kom fram, at hann skal hava verið í so næskur við kvinnur. Fyri nøkrum døgum síðani søgdu 57 prosent av veljarunum, at verandi guvernørurin, Gray Davis, sigur at fara frá. Í gjár søgdu 51 prosent tað sama*

# Tvær milliardir fara at búgva í fátækrabýlingum

**Kemur ikki broyting í, verður fólkatalið í heimsins ringastu fátækrabýlingum tvífaldað um 30 ár.**

FÁTÆKRADØMI

*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Innihaldið í einari nýggjari frágreiðing hjá búsetingarstovninum hjá ST, HABITAT, er skelkandi. Sum er búgva ein triðingur av heimsins býbúgvum í fátækrabýlingum, og tað verður nógv verri enn.

Stjórin í HABITAT, Anna Tibaijuka, sigur við Aftenposten, at gongdin við teimum altsamt veksandi fátækrabýlingunum er einki minni enn ein bumba, sum bíðar eftir at bresta. Hon vísir á, at allastaðni kring heimin flyta fólk úttan av landinum inn í teir stóru býirnar.

- Í 2050 verða umleið níggju milliardir fólk í heiminum, og okkara framrokningar vísa, at av teimum fara seks milliardir at búgva í býunum. Og av teimum seks milliardunum fara umleið 3,5 milliardir at búgva í fátækrabýlingum, sigur Anna Tibaijuka.

Sum er búgva umleið 550 milliónir fólk í fátækrabýlingum í Asia, í Afrika er talið 187 milliónir og í Latínamerika 128 milliónir.

Samstundis fegnast HABITAT um, at royndir at berjast ímóti fátækradøminum hava givið úrslit. Serliga í Eysturasia hava mong fátæk fingið betri umstøður. Fyrimyndin er Kina, har búskaparvøkstur hevur gjørt, at fátækradømið er nógv minkað, sigur ST-stovnurin.

Men stovnurin leggur afturat, at tað er alneyðugt at gera nógv meiri aðrastaðni, og at øll heimsins lond síggja tað sum eina felags skyldu at loysa trupulleikarnar.

**ítróttur**

Nr. 189 • týsdagur • 7. oktober 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Jón Rói illa skaddur

**Sjálvur kvíður stinni verjumaðurin á landsliðnum fyri, at hann ikki verður førur fyri at spæla fótbólt tað mesta av næsta hálva árinum**

ÚTISETI

*Jóannes Hansen*

Jón Rói Jacobsen er knæskaddur. Heilt hvussu álvarsamur skaðin er verður staðfest í dag, tá ið Jón Rói skal skannast í Jyllandi. Men sjálvur roknar Jón Rói við, at tað í dag fer at verða staðfest, at krossbandið í øðrum knænum er so mikið illa farið, at tað verður neyðugt við skurðviðgerð og steðgi frá fótbólti í fleiri mánaðir – kanska í eitt hálvt ár.

Hvussu er hetta komið fyri?

– Tað var undir venjing mikudagin. Eg snaraði mær á, uttan at nakar annar var í nánd av mær. Tað hoyrdist eitt klikk í knænum, og eg small um. Tað var ikki hugsningur um at standa á beininum. Síðani havi eg gingið á høkjum. Hósdagin var eg hjá serlækna, sum heldur til í nánd av Brøndby stadion. Hann kannaði knæið og staðfesti, at tað er krossbandið, sum tað er galið við. Um krossbandið er slitið ella ikki, kundi hann ikki siga við vissu. Tað verður staðfest í sambandi við skanningina, sigur Jón Rói Jacobsen úr danska høvuðsstaðnum.

Men tað ber steðg frá fótbóltsspælinum við sær?

– Nú fáa vit at síggja, hvat teir fara at siga eftir skanningina.Men eg gangi út frá, at tað verður ikki hugsningur um hjá mær at spæla fótbólt í fleiri mánaðir nú. Tá ið talan er um krossbandsskaðar, siga teir, at tað er neyðugt við skurðviðgerð og langari uppvenjingartíð. Tá ið krossbandið er heilt slitið, er neyðugt við nýggjum krossbandi, men eg veit sum sagt ikki enn, hvussu illa skaddur eg eri, sigur Jón Rói Jacobsen, sum ongantíð áður hevur verið plágaður av álvarsligum skaða.

– Tað longsta, sum eg havi verið burtur frá fótbólti orsakað av skaða, hevur verið einir tíggju dagar. So hetta er ein púrasta nýggj støða fyri meg.

### Gevur ikki skarvin yvir

Sáttmálaskeiðið hjá Jón Róa Jacobsen og Brøndby IF gongur út á nýggjárinum. Tí kann tað hugsast, at tað var heilt út av lagi óheppið fyri Jón Róa, at tað skuldi verða akkurát nú, at hann varð skaddur. Jón Rói sær upp á hetta út frá tveimum sjónarhornum:

– Tað kann hugsast, at tað ikki styrkir um fyritreytirnar hjá mær fyri víðari samstarvi í Brøndby, at eg ivaleyst ikki verði førur fyri at luttaka í venjingini saman við hinum og at spæla fótbólt næstu mánaðirnar. Leiðslan í felagnum og eg havi ikki enn tosað saman um møguleikarnar fyri framtíðar samstarvi. Tað var ætlanin at gera tað i næstum. Á hinari síðuni kunnu vit kanska siga, at tað er betri, at skaðin hendi nú, enn tað hevði verið, um tað hevði verið fram ímóti ljósastu tíðini. Tað er kanska frægari at ganga skaddur fram ímóti hávetri, enn tað hevði verið at gingið á høkjum fram ímóti sumrinum.

Skaðin hevur ikki ávirkan á ætlanirnar hjá tær?

– Eg ætli mær undir øllum umstøðum at halda fram at spæla fótbólt uttanlands. Í Brøndby er kappingin ógvuliga stór og tøtt. Eg vóni, at tað fer at bera til hjá mær at halda fram her. Um tað ikki fer at bera til, so rokni eg avgjørt við, at tað fer at bera til í onkrum øðrum felag.

Tú hevur ikki hug at geva skarvin yvir, nú tú vart so óheppin?

– Tað hugsi eg yvirhøvur ikki um. Eg havi gjørt av at royna at gerast yrkisspælari, og eg ætli framvegis at geva mær sjálvum møguleikan at finna fram til, hvat kann spyrjast burturúr, sigur Jón Rói Jacobsen. Tað tykist, at hann hevur sinniliga yvirskotið, sum skal til. Bæði at koma seg eftir skaðan og til at bíða eftir møguleikanum at sleppa framat í fremstu røð.

Jón Rói hevur alla tíðina vant saman við besta Brøndby liðnum. Hesar seinastu vikurnar hevur hann mest sum bara spælt við talent liðnum.

– Tað hevur gingið framúr væl hjá okkum. Tað hevur verið rættuliga hugaligt at spæla saman við so góðum spælarum, men nú verður tað neyvan meiri fótbóltsspæl hjá mær í ár.

Hvat við landsliðnum?

– Tað er ikki minst landsliðið, sum er drívmegin hjá mær. Eg vóni inniliga, at tað fer at eyndast at verða komin heilt fyri seg aftur, tá ið nýggja HM undankappingin verður á skránni, sigur Jón Rói Jacobsen. Í dag er hann í Jyllandi. Knæið verður gjøgnumlýst og kannað. Tað er longu staðfest, at krossbandið er skatt. Í dag fær Jón Rói at vita, hvussu leingi hann skal binda frið, nú hann fyri fyrstu ferð í sínum 20 ára langa lívi er álvarsliga skaddur.



*Eg vóni inniliga, at tað fer at eyndast at verða komin heilt fyri seg aftur, tá ið nýggja HM undankappingin verður á skránni, sigur Jón Rói Jacobsen*